**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Úttøkuskipan til HM 2024

Starvsnevnd SSF hevur samtykt fylgjandi kravtíðarskipan til HeimsMeistarastevnuna á langgeil sum verður í Doha í Katar 2. - 18. februar 2024, har sjálv svimjistevnan er 11. - 17. februar 2024.

Kravtíðirnar til einstaklingakappingar eru sum ásettar av altjóða sambandinum World Aquatics, sí https://www.worldaquatics.com/competitions/2969/world-aquatics-championships-doha-2024/info

Tað vil siga við A og B kravtíðum, har B-kravtíðin kann nýtast um einans éin luttakari er í viðkomandi kappingargrein, og A-kravtíðin ífall at tveir luttakarar av sama kyni vilja luttaka í somu grein.

Gevið gætur at hesar skulu klárast á serliga World Aquatics góðkendum stevnum, innan ásetta tíðarskeið, um tær skulu kunna nýtast sum tilmeldingartíðir til sjálva HeimsMeistarastevnuna.

Reglur World Aquatics loyva hartil at vit kunnu taka út eyka svimjarar, upp til og við at hópurin er tilsamans tvær (2) kvinnur og tveir (2) menn. Hesir eyka svimjarar kunnu tá í mesta lagi luttaka í tveimum (2) greinum, og væl at merkja ikki í somu grein sum nakar annar av okkara.

Starvsnevndin tilskilar sær rætt at taka út eyka svimjarar til liðsvimjing.

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. september 2023.

Úttøka av juniorum koma upp á tal, serliga um færri enn tveir seniorar av hvørjum kyni klára kravtíð. Gevið gætur at World Aquatics hevur ásett minstaaldur, at svimjarar skulu fylla 14 ár í sama ári sum stevnan er, um ikki tey hava klárað kravtíð sum ásett av World Aquatics.

Kravtíðarskeiðið er frá og við 16. juni 2023 (FML 2023), til og við 10. desember 2023 (EMS 2023)

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:

http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíð, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Viðkomandi landslið verður úttikið sum skjótast aftaná at kravtíðarskeiðið er runnið.

Fyrivarni verður tikið fyri prentvillum.

Við svimjikvøðu

Starvsnevnd SSF

ATLANTIC AIRWAYS

# Kravtíðir til HM 2024

At klára á langgeilastevnum við góðkenning frá SSF innan kravtíðarskeiðið

| Kravtíðir - Kvinnur | | | Kravtíðir - Menn | |
|---|---|---|---|---|
| B - 1 svimjari | A - 2 svimjarar | | A - 2 svimjarar | B - 1 svimjari |
| 0:25.92 | 0:25.04 | **50 frí** | 0:22.12 | 0:22.89 |
| 0:56.15 | 0:54.25 | **100 frí** | 0:48.51 | 0:50.21 |
| 2:02.81 | 1:58.66 | **200 frí** | 1:47.06 | 1:50.81 |
| 4:19.34 | 4:10.57 | **400 frí** | 3:48.15 | 3:56.14 |
| 8:56.03 | 8:37.90 | **800 frí** | 7:53.11 | 8:09.67 |
| 17:04.20 | 16:29.57 | **1500 frí** | 15:04.64 | 15:36.30 |
| 0:29.21 | 0:28.22 | **50 rygg** | 0:25.16 | 0:26.04 |
| 1:02.71 | 1:00.59 | **100 rygg** | 0:54.03 | 0:55.92 |
| 2:15.67 | 2:11.08 | **200 rygg** | 1:58.07 | 2:02.20 |
| 0:32.11 | 0:31.02 | **50 bringa** | 0:27.33 | 0:28.29 |
| 1:09.71 | 1:07.35 | **100 bringa** | 0:59.75 | 1:01.84 |
| 2:31.02 | 2:25.91 | **200 bringa** | 2:10.32 | 2:14.88 |
| 0:27.24 | 0:26.32 | **50 firvald** | 0:23.53 | 0:24.35 |
| 1:00.37 | 0:58.33 | **100 firvald** | 0:51.96 | 0:53.78 |
| 2:13.73 | 2:09.21 | **200 firvald** | 1:56.71 | 2:00.79 |
| 2:17.63 | 2:12.98 | **200 blandað** | 1:59.53 | 2:03.71 |
| 4:52.97 | 4:43.06 | **400 blandað** | 4:17.48 | 4:26.49 |

ATLANTIC AIRWAYS